ítróttur

Nr. 101 • leygardagur • 31. mai 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

B36 líkist ikki sær sjálvum

Hóast teir eiga at hava nakrar av bestu og royndastu bóltspælarunum, so sæst einki til hetta, tí teir í B36 ikki megna at fáa nyttu burturúr sínum egnu dygdum, og tí teir tykjast vera uttan neyðuga sjálvsálitið

B36 Í TUNGUM SJÓGVI
Jóannes Hansen



Tað hevur neyvan styrkt um B36-liðið, at fleiri bólttryggir leikarar, eitt nú Arnbjørn Danielsen, eru at síggja í øðrum feløgum í ár

Mynd: Álvur Haraldsen

Hvør verður meistari. Sum altið varð spurt soleiðis undan kappingarbyrjan, og tað var breið undirtøka fyri, at B36 var størsti favoritturin. Tað var ikki so undarligt, tí B36 eigur fleiri landsliðsspælarar, enn nakað annað lið, og tað kappast fleiri um plássini á besta liðnum, enn tað gera í nøkrum øðrum felag.

Ein sættingur av kappingini er farin, og tað kann framvegis væl vera, at B36 5. oktober fer at standa við gullkrónunum, tá ið teir hava spælt síðsta dystin á útivølli ímóti GÍ. Men í løtuni er tað lítið, sum bendir á, at tað fer at verða soleiðis. B36 hevur spælt tríggjar landskappingardystir, og teir hava bara fingið stig í málleysu uppgerðini í Vági. Tað var í fyrsta umfarinum, og úrslitið varð ikki mett at vera so galið. Síðani hava teir tapt 3–1 á heimavølli ímóti EB/Streymi, og hósdagin taptu teir 1–0 á Toftum. B36 er næstaftast. Tað er bara Skála, sum hevur fingið færri stig, so talan verður um sanna botnuppgerð, tá ið B36 mánakvøldið fer inn á Skála!

Tað mundi neyvan nakar óðrað, tá ið B36 í morgin fyri tveimum vikum síðani í Klaksvík klæddi KÍ av 7–1 í seinnu hálvfinaluni.

Dygdirnar koma ikki til sín rætt

Í fótbóltsprátinum kring landið verður B36 snarað og vent, og áskoðanirnar um, hví tað higartil hevur gingið av skriðuni, eru ivaleyst fleiri. Avrikið á Toftum vísti, at B36 á ongan hátt megnar at fáa nyttu burturúr tilfeinginum, sum teir hava, og í hvussu so er tveir trupulleikar eru rættuliga eyðsýndir.

Annar trupulleikin er, at liðið ikki megnar at fáa glið á framrættaða miðvallarpartin. Á Toftum vóru Julian Johnsson, Klæmint Matras og Sverrir Kjærbo á miðvøllinum. Julian og Klæmint eru stríðsmenn, sum kunnu renna sólina svarta, men teir eru ikki spælstýrarar. Sverrir Kjærbo tykist hava dygdir, sum eru neyðugar hjá teimum, sum skulu stýra spælinum. Men hann er nýggjur á stjørnuklædda liðnum, og tí kann tað ikki roknast við, at hann beinanvegin megnar at vísa tyngdina og myndugleikan, sum skal til, tá ið taktstokkurin skal svingast.

Tað eru fleiri fínir framrættaðir miðvallarspælarar á B36 liðnum, men teir eru ikki á miðvøllinum. Her verður hugsað um John Petersen, sum so ofta hevur verið sentrali miðvallarin á landsliðnum, um Jens Kristian Hansen, sum eftir drúgvan skaðasteðg var við aftur á Toftum, og Pól Thorsteinsson. Teir hava báðir áður vístseg at hava dygdirnar, sum B36 liðið á Toftum skriggjaði eftir.

Hin trupulleikin er, at spælið er lagt soleiðis til rættis, at tað ikki ber til hjá fleiri av teimum, ið áður hava verið eyðsýndir, at koma til sín rætt. Á Svangaskarði var B36 í 4–3–3 útgangsstøðu. Jákup á Borg og Heðin á Lakjuni vóru frammi í hvør sínum borði. Oftast noyddust viðspælararnir at spæla í føturnar á teimum, tá ið teir høvdu ryggin ímóti mótstøðumálinum, og so var tað – serliga hjá Heðini – torført at sleppa víðari. Á landsliðnum er Jákup á Borg ytsti miðvallarin í 4–4–2 skipan, og tað er eisini í hesi spælskipanini, at Heðin á Lakjuni í vinstra borði hevur vístsínar størstu dygdir. Dygdin hjá skjótu monnunum er, tá ið tað verður spælt í tómu økini aftanfyri verjuspælararnar. Tað bar ongantíð til sunnudagin á Svangaskarði.

Fólkið

Tá ið B36 tey seinastu árini hevur verið upp á tað besta, hevur tað millum annað verið við skjótum fyrstu ferð sendingum, har John Petersen og Jákup á Borg hava verið í miðdeplinum. Einki var at siggja til hetta á Svangaskarði, og manningarligu broytingarnar hesa seinastu tíðina hava ikki styrkt um fyritreytirnar fyri sovornum spæli. Sammett við í fjør eru bólttryggir spælarar sum Egil á Bø, Magni á Lakjuni og Arnbjørn Danielsen burtur. Heðin á Lakjuni, Allan Mørkøre og Sonny Johansen eru komnir afturat, men teir hava skarað framúr við øðrum dygdum enn hesum.

Á Svangaskarði bar ikki til at síggja, hvørjar dygdir Rúni Elttør skal veita B36 liðnum. Í hvussu so er ikki, tá ið havt verður í huga, at tveir og kanska tríggir av ungu B36 monnunum, sum eru uppvaksnir í felagnum, sótu uttanfyri. Her verður hugsað um Fróða Clementsen og Kenneth Jacobsen og eisini Niels Joensen, sum hevur verið nógv skaddur. Heini í Skorini er eisini skaddur. Niels og Heini høvdu – um teir vóru væl fyri – verið upplagdir kandidatar at roynt á miðvøllinum í núverandi støðuni, og tað hevði heilt víst verið eina roynd vert at flutt Pól ella Jens Kristian fram á viðvøllin og framvegis havt Fróða Clementsen í miðverjuni.

Avrikið á Toftum vísti favorittlið, sum er tyngt av sær sjálvum. Spælskipanin var ikki uppløgd, leiklutirnir hjá spælarunum vóru neyvan optimalir, og einki er at ivast í, at sjálvsálitið fer at verða drenað úr einstøku spælarunum og liðnum, um gongdin framvegis fer at verða tann, sum hon hevur verið higartil.

Eftir túrin á Skála verður friður í landskappingini í tvær vikur. Tað verður nógv at arbeiða við venjingarkvøldini. Trupulleikin er bara, at B36 eigur fýra spælarar, sum fara at brúka tíð upp á landsliðið. Ímóti Íslandi og Týsklandi fæst at síggja, um teir líkjast meiri sær sjálvum sammett við undanfarin ár, enn teir og B36 hava vístsígartil í landskappingini. Um teir ikki fara at gera tað, so fer tað heilt víst eisini at ganga út yvir avrikini og harvið úrslitini hjá landsliðnum.

Komandi dystir

1. deild menn

01.06	NSÍ-VB	Petur Skarðenn
01.06	HB-GÍ	Jens P. Brattalíð
01.06	FSV-EB/S	Eiler Rasmussen
01.06	KÍ-B68	Niklas á Líðarenda
02.06	Skála-B36	Suni Hohansen

2. deild menn

31.05	ÍF-B71	Petur Hans Joensen
31.05	VB-B36	Hans F. Hansen
31.05	KÍ-B68	Jákup Martin Kjeld
31.05	TB-Sumba	Pætur Clementsen
31.05	AB-LÍF	Regin Egholm

3. deild menn

01.06	NSÍ-Royn	Rúni Gaardbo
01.06	Skála-B36	Magni Hansen
01.06	TB-ÍF	Marlon Kjærbo
01.06	FSV-EB/S	Emil Hentze
01.06	HB-GÍ	Andrew Christiansen

1. deild kvinnur

01.06	EB/S-FSV	Ovi Heinesen

Byrjaðu aftur á botni á Tvøroyri

Á Tvøroyri skal kappróðurin nú endurreisast eftir at hann var um reppið at fara heilt fyri bakka og genturnar, sum nú manna nýggja Firvald, eru fyrstu spírarnir í eini langtíðar menningarætlan

KAPPRÓÐUR
Áki Bertholdsen

Tað var rættur hátíðardámur á bryggjuni á Tvøroyri, tá ið nýggi Firvaldur varð sjósettur flaggdagin og hetta eru tær, sum manna hann. Men tær eru so ungar og óroyndar, at ongin eigur at verða vónsvikin, verða úrslitini ikki eftir vild beinanvegin, tí nú krevur nógv at gera seg galdandi

Tær eru ungar og tær eru óroyndar.

Men tær eru fyrstu spírarnir sum at enda skulu fáa Tvøroyri á róðrarkortið aftur.

Seinastu árini er kappróðurin í teirri fyrr so stoltu kappróðrarbygdini, Tvøroyri, at kalla heilt dottin niðurfyri og í fjør var fallið so djúpt, at kallað varð enntá saman til fundar at taka kappróðrarfelagið av.

Men so eydnaðist at fáa nýtt fólk í nevndina og síðani hava tey roynt at leggja lunnarnir undir felagið aftur.

Men tey vita, at skal nakað haldgott vera á byggja, er neyðugt at byrja við grundini og tað eru tey ungu.

– So tað var har, vit byrjaðu og tí settu vit okkum fyrst og fremst fyri at fáa ungdómin aftur í bátarnar, sigur Súnhild Holm, sum nú er formaður í felagnum.

Og fyrsta stigið varð longu tikið í fjør, tá ið tað eydnaðist manna Firvald við eini gentumanning.

Men fyri at gera tað enn meiri lokkandi, var eitt tað fyrsta tey gjørdu, at fáa Símun Hansen at smíða teimum eitt nýtt fimm mannafar.

Nýggi báturin kom herfyri og sjálvan flaggdagin varð hann doyptur og sjósettur.

Hann hevur fingið navnið Firvaldur og genturnar, sum róðu í fjør, hava gjørt av at halda fram í ár og síðani hava tær vant dúgliga.

Og Súnhild Holm sigur, at tær lata væl at bátinum, hann er øðrvísi enn gamli firvaldur við tað, at hann er nógv rankari og dregur ikki so nógv eftir sær.

Tekur tíð

Men tey vita eisini, at tað tekur tíð at byggja uppaftur frá grundini, so Súnhild ásannar eisini, at enn ber tað ikki til at hava ov stórar vónir til tær á Firvaldi.

– Genturnar, sum manna Firvald, eru 14 og 15 ára gamlar og hetta er bara annað árið, tær rógva. Og tær skulu rógva ímóti garvaðum rógvarum, sum eru nógv eldri, so tað er skilligt, at krøvini til genturnar má vera hareftir, tí vit leggja ikki ov stóra ábyrgd á tær enn, sigur hon.

Hon sigur, at nógvar av hinum gentumanningunum hava róð í nógv ár, so enn eru tær á Firvaldi við fyri at læra.

Hon sigur, at onki aldursmark er fyri gentumanningarnar og tað ger tað eitt sindur órættvíst viðhvørt, tí ásannast má, at tað er stórur munur á nýbyrjarum og so teimum, sum hava róð í fleiri ár.

– Vit vita, at tað ber ikki til at vænta góð úrslit, fyrrenn vit hava róð í fleiri ár, leggur hon afturat.

Á Norðoyastevnu í dag verður so fyrsi róðurin í ár, her genturnar á Firvaldi eru við.

Felagið hevur eisini aðrar ungar manningar. Firvaldur er eisini mannaður við dreingjum og Hulda er mannaður við gentum, men tær báðar manningarnar hava vant so stutt, at tær verða ikki við á Norðoyastevnu.

Hinvegin eru ongi útlit til at 10 mannafarið Suðuroyingur, verður mannaður aftur í ár.

– Tað eru ikki útlit til at tíggjumannafarið verður mannað, fyrrenn vit hava havt dreingjamanningarí fleiri ár, so tað verður helst ein løta enn, tí dreingir hava ikki róð kapp á Tvøroyri leingi.

Skapa góðar karmar

Men teir innari karmarnir skulu eisini vera í lagi og tí hevur róðrarfelagið gjørt nokk so fitt við at hampa og snøgga um felagshølini, umframt at róðurmaskinur eru útvegaðar.

– Skulu vit fáast tey ungu at trívast, er neyðugt at umstøðurnar eru góðar og nú er neystið blivið eitt stað, har ungdómurin kann hittast til venjingar og til hugna.

Og teirra vón er, at nýggi Firvaldur og eitt miðvíst ungdómsarbeiðið annars so við og við skal fara at menna felagið aftur, so at Tvøroyri aftur verður sett á róðrarkortið- um nøkur ár.

Súnhild Holm sigur, at ætlanin við øllum hesum fer fyrst og fremst at vekja áhugan hjá teimum ungu fyri kappróðri og tað heldur hon hevur eydnast, tí fleiri og fleiri ung fylkjast nú í felagnum.

Og á Jóansøku er eisini ætlanin at skipa fyri róðuri fyri børnum.

Tað var annars Vilborg Hammer í Froðba, ið er heiðurslimur í felagnum, sum fekk heiðurin at doypa nýggja Firvald og tað gjørdi hon við orðunum: Runt firðir og sund eftir sigrum vit leita. Firvaldur skalt tú eita.

Annars eru hinir heiðurslimirnir í felagnum, sum eru á lív Hesir: Hans A Poulsen, Gunnar Vestergaard og hjúnini Kaj og Anna Nolsøe.

Kappróðurin á Tvøroyri var næstan heilt dottin niðurfyri og nýggja mnevndin setti sær fyri at byrja við teimum ungu og at fáa ungdómin aftur í bátarnar. Tað hevur eydnast. Her taka tær fyrstu tøknii við nýggja Firvaldi

Startrøðin á norðoyastevnu

45 bátar fara at rógva kapp á norðoyastevnu í ár, og teir fara at liggja í hesi startrøð.

5-mannafør, gentur
1 Junkarin
2 Ørnin
3 Firvaldur
4 Sílið
5 Havfrúgvin
6 Tjaldrið
7 Blikur
8 Drekin
9 Kollur
10 Fípan Fagra

5-mannafør, dreingir
1 Havfrúgvin
2 Royndin Fríða
3 Kollur
4 Báran
5 Fípan Fagra
6 Blikur
7 Tjaldrið
8 Sílið

6-mannafør, kvinnur
1 Fuglfirðingur
2 Páll Fangi
3 Lómur
4 Kollfirðingur
5 Smyril
6 Fortuna
7 Gongurólvur

6-mannafør, menn
1 Páll Fangi
2 Gongurólvur
3 Smyril
4 Jarnbardur
5 Lómur
6 Strálan
7 Sølmundur
8 Sundabáturin
9 Snopprikkur

8-mannafør
1 Teistin
2 Kvívíkingur
3 Toftabáturin
4 Gullbrandur
5 Knørrur
6 Argjabáturin
7 Ørvur

10-mannafør
1 Eysturoyingur
2 Havnarbáturin
3 Nólsoyingurin
4 Vestmenningur